# Ísur á Klaksvík

**KULDI**

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Globala upphitingin gjørdi seg ikki rættuliga gandandi í Klaksvík týsmorgunin. Sjógvurin var frystur og tann lokali fuglurin kundi spáka eftir ísinum og hyggja irriteraður eftir góðgætinum, sum svam undir tunnu ísskorpuni.

Men hóast tað hevur verið kalt í vetur, so er tað lítið móti fyrr. Eldri Klaksvíkingar minnast, at tað gangandi um vánna í vikur, tá teir vóru ungir. Tað kavar av og á í dag, men ongantíð sum fyrr. Klaksvíkingar minnast, at teir kundu standa á skíð oman av Klakki, tvørtur um vánna og yvir á Varpið, í eini blandingi av alpinskum stórsnirr og norskari skískáping.

Og hagtølini hjá veðurmonnunum vísa, at tey eldru ikki altíð so minnast rætt, tí hóast broytingar eru í veðurlagnum, so er veðrið í eini javnvág, har heit summør og kaldir vetrar ganga aftur og aftur og skiftast viðhvørt. Tað er hvørki verri ella betri veður í dag, hyggja vit eftir hagtølunum seinastu 100 árini. Hóast sólin skein alt summarið, tá eldra ættarliðið vóru børn, so setti seinasta summar, summarið ár 2000 met hvat sóltímum viðvíkur fyri alla seinastu øld. Her er helst heldur talan um, at vit hava fingið tey vælsignaðu evnini at minnast tað góða sum frálíður.



*Sjógvurin var frystur á vágni í Klaksvík í gjáramorgun*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av norði og kavæælingur, men eisini sólglottar. Hitalagið millum +1 og ÷2 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Lot til andøvsgul av norði og sólglottar, men eisini okkurt kavæælið. Hitalagið millum frostmarkið og ÷3 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Hann minkar vindin niður í lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitalagið millum ÷3 og ÷6 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og landsynningi eitt skifti upp í hvassan vind av eystri. Sum frálíður vátaslettingur ella regn og lýggjari.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷17 |
| Nuuk | ÷8 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | ÷3 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | ÷1 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | ÷1 |
| Lerwick | ÷2 |
| Aberdeen | 0 |
| London | 8 |
| Tromsø | ÷9 |
| Bergen | ÷6 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | ÷13 |
| Keypmannah. | ÷4 |
| Helsinki | ÷7 |
| Moskva | ÷16 |
| Berlin | 0 |
| Warzawa | ÷4 |
| Kiev | ÷3 |
| Bukarest | 8 |
| Paris | 10 |
| Madrid | 8 |
| Róm | 14 |
| Malorca | 17 |
| Athen | 15 |
| Malta | 16 |
| Tunis | 18 |
| Beijing | ÷6 |
| New Dehli | 20 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | – |
| New York | 0 |
| Miami | 18 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 31 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 31 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 954 hPa. í útsynning úr Írlandi fer móti Suður-Noreg.




Lágtrýstið við Suður-Noreg fer í landnyrðing og eitt hátrýst yvir Grønlandið verður væntandi yvir Føroyum fríggjadagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 05/02 kl. 06[00]–06/02 kl. 06[00]. Hitin í gjár: ÷2,1°
Minsti hiti máldur í febr.: ÷11,0° Mesti hiti máldur í febr.: 11,0°

## AVFALL




Avfallið: 7,0 mm – mált frá 05/02 kl. 06[00]–06/02 kl. 06[00]
Avfallið higartil í februar: 26,9 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

1. febr.: Fyrra kvarter
7. febr.: Mánin næstur jørðini
8. febr.: Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. feb. | 05:36 | 18:06 | 04:36 | 17:06 | 04:51 | 17:21 | 07:36 | 20:06 | 08:36 | 21:06 | 03:51 | 16:21 | 02:51 | 15:21 | 05:51 | 18:21 | 06:51 | 19:21 | 05:21 | 17:51 | 06:36 | 19:06 |
| 8. feb. | 06:35 | 19:04 | 05:35 | 18:04 | 05:50 | 18:19 | 08:35 | 21:04 | 09:35 | 22:04 | 04:50 | 17:19 | 03:50 | 16:19 | 06:50 | 19:19 | 07:50 | 20:19 | 06:20 | 18:49 | 07:35 | 20:04 |
| 9. feb. | 07:33 | 20:00 | 06:33 | 19:00 | 06:48 | 19:15 | 09:33 | 22:00 | 10:33 | 23:00 | 05:48 | 18:15 | 04:48 | 17:15 | 07:48 | 20:15 | 08:48 | 21:15 | 07:18 | 19:45 | 08:33 | 21:00 |
| 10. feb. | 08:27 | 20:52 | 07:27 | 19:52 | 07:42 | 20:07 | 10:27 | 22:52 | 11:27 | 23:52 | 06:42 | 19:07 | 05:42 | 18:07 | 08:42 | 21:07 | 09:42 | 22:07 | 08:12 | 20:37 | 09:27 | 21:52 |

fk

Sig tað uttan rokning




petur & petur • 320870

Føroya Tele kann nú bjóða tær eina heilt nýggja tænastu til tína GSM fartelefon, ið kallast Føroya Teletíð.

*Kom inn í eina av Telebúðunum og hoyr meira um, hvussu tú sleppur undan telefonrokningunum...*

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 • Fax 30 30 31 • www.tele.fo